LM-088/2023

Løgtingslóg 17.

Tórshavn 5. februar 2024

Løgmálaráðið

Tinganes

110 Tórshavn

Att. Elsa Magnussen

Sent til: lmr@lmr.fo

Ummæli til uppskot til løgtingslóg um fosturtøku (fosturtøkulógin)

Javnstøðunevndin hevur fingið til ummælis lógaruppskot til løgtingslóg um fosturtøku (fosturtøkulógin).

Javnstøðunevndin tekur yvirskipað undir við uppskotinum, serliga vísandi til at kvinnan við hesum lógaruppskoti fær avgerðarrættin í samband við abort innanfyri eitt ásett tíðarmark.

Javnstøðunevndin hevur hesar viðmerkingar til lógaruppskotið annars:

§ 1 og § 7 abort uttan loyvi og ráðgeving

Javnstøðunevndin tekur undir við, at kvinnur, sum búgva í Føroyum og eru við barn, sjálvar kunnu taka avgerð um at fáa abort innanfyri eitt ásett tíðarmark.

Javnstøðunevndin metir eisini, at eitt tíðarmark áljóðandi "áðrenn endan av 12. viku í viðgongutíðini" er eitt hóskandi tíðarmark, vísandi til at flestar kvinnur, sum fáa abort í Føroyum og í grannalondum fáa abort áðrenn 12. graviditetsviku. Við hesum fáa flestar kvinnur ein realistiskan møguleika at finna út av, at tær eru við barn, umhugsa støðuna og taka støðu innanfyri freistina. Tó so, at tað eru kvinnur, sum av ymiskum orsøkum hava tørv á fosturtøku aftan á hesa tíðarfreistina, sí viðmerking til § 3.

Javnstøðunevndin metir eisini, at tað er gott, at kvinnur kunnu fáa bjóðað ráðgeving og vegleiðing í samband við støðutakanan til abort, og at hendan ráðgevingin fevnir bæði um stuðul undir og eftir graviditet. Javnstøðunevndin skal tó leggja áherðslu á, at ein slík ráðgeving ikki eigur at verða tvingað kvinnum, ið ikki ynskja hana. Í hesum sambandi skal vísast til, at kanningar og gransking á økinum vísa á, at stórur partur av kvinnum, ið ynskja abort, hava tikið greiða støðu, áðrenn tær koma í samband við sjúkrahúsverkið.

§§ 3-5 loyvi til fosturtøku eftir 12. viku

Javnstøðunevndin tekur undir við, at loyvi kann gevast til abort eftir ásettu treytunum í §§ 3-5 eftir 12. graviditetsviku.

§ 9 aldursmark

Javnstøðunevndin hevur ikki ítøkiliga viðgjørt spurningin um, hvørt kvinnur ella gentur undir 18 ár eiga at hava avgerðarrættin sjálvar í spurningum um abort, ella um talan skal vera, sum

lógaruppskotið leggur upp til, at kvinnan skal hava frammanundan samtykki frá tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan.

Javnstøðunevndin hevur yvirskipað ta hugsan, at eingin eigur at tvinga eina kvinnu ella gentu til at gjøgnumføra eina abort ella ein graviditet, hon ikki ynskir. Mett verður, at tær orsøkir ella støður, sum eru positivt nevndar í serligu viðmerkingunum til § 9, stk. 2 sum grundgeving fyri at loyva kvinnu undir 18 ár abort uttan at innheinta samtykki, eru ógvuliga avmarkaðar og geva ikki nógva rúmd at meta um ítøkiligar støður, har eitt nú kvinnan verður tvungin at gjøgnumføra ein graviditet, tó uttan at verða í vanda fyri at verða útsett fyri harðskapi ella at verða sosialt rikin burtur.

Mælt verður til, at karmarnir fyri, at nær loyvi kann gevast til abort uttan at innheinta samtykki, verða víðari og geva møguleika fyri at meta um aðrar ítøkiligar støður, ið ikki eru positivt nevndar í serligu viðmerkingunum.

§ 14 samráð

Spurningurin um abort er ein politiskt viðkvæmur spurningur, og við tað at landsstýrisfólkið setir samráðið, er ávísur vandi fyri, at eitt slíkt samráð verður mannað grundað á politisk seráhugamál heldur enn á fakligar førleikar. Hetta er ikki viðvirkandi til at skapa álit á samráðið, tryggleika og gjøgnumskygni fyri tær kvinnur, ið søkja samráðið um loyvi til abort.

Mælt verður til, at annar myndugleiki við málsinnliti, eitt nú Fólkaheilsustýrið, er setanarmyndugleiki hjá samráðnum í staðin.

Javnstøðunevndin fegnast um, at lógaruppskotið leggur upp til, at samráðið hvørt ár skal gera ársfrágreiðing til tess at skapa gjøgnumskygni og samanhang í útinnanini av virkseminum hjá samráðnum. Mælt verður til, at ítøkiligar umstøður, ið liggja til grundar fyri avgerðir hjá samráðnum, eisini verða lýstar í frágreiðingini, og ikki bara tilvísingar til ásetingar, hetta til tess at tryggja gjøgnumskygni, soleiðis at møguligt er at síggja, hvussu undantaksásetingarnar í § 3 verða tulkaðar í praksis.

§ 18 revsiásetingar

Javnstøðunevndin tekur undir við, at kvinnur við hesum lógaruppskotinum ikki longur kunnu lógsøkjast fyri at fáa ólógligа abort, og er hetta eisini í samsvar við verandi rættarstøðu, har kvinnur í nógv ár ikki hava verið lógsøktar fyri at fáa abort í stríð við lóggávuna[1].

Vegna Javnstøðunevndina

Bjørk Maria Kunoy, forkvinna

[1] Eingi mál um brot á fosturtøkulógina eru at finna í talgildu skipanina hjá Føroya Politi í tíðarskeiðnum 2006-2023. Talgilda skipanin fevnir ikki um mál eldri enn 2006, og tí ber ikki til at siga, hvussu langt aftur í tíð, vit skulu fyri finna seinasta løgreglumálið um brot á fosturtøkulógina, uttan so at ein manuel leiting verður framd.